# haldið



*Hundrað fløgg, hvørt við sínum árstali frá 1908 fram til 2008, vóru spjeidd út á trý borð*




*Eitt nýtt búmerki, ið skal nýtast í sambandi við øll tiltøk, sum verða fyriskipað í sambandi við 100 ára haldið hjá Tórshavnar kommunu sum fólkavald kommuna. Á myndini saman við borgarstjóranum Birgir Kruse, sum samskipar tiltøkini í sambandi við 100 ára haldið hjá Tórshavnar kommunu*

# Bergen loysir seg ikki

**Tað er ikki rætt tá sagt verður, at Norröna siglir fullfermd við ferðafólki úr Bergen summarmánaðirnar. Hevði tað verið so, góvust vit ikki við siglingini, sigur Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarleiðari á Smyril Line**

FERÐAFÓLKA-FLUTNINGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í blaðnum mikudagin greiddu vit frá ferðamanni, sum ikki slapp aftur til Noregs, tí Norröna avlýsti túrin til Bergens. Hesin ferðamaðurin skilti ikki, at Norröna yvirhøvur gavst at sigla upp á Bergen, tí, sambært honum, so sigldi Norröna full av ferðafólki allar summarmánaðirnar.

Men hesum vísir Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarleiðari á Smyril Line, aftur.

Vit hava sjálvandi nágreinilig hagtøl yvir ferðatólkatalið á Bergensrutuni, og hesi vísa, at vit liggja niðanfyri 600 ferðafólk í meðal til ein belegning upp á 1482, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann sigur, at um Norröna sigldi fullfermd við ferðafólki hvønn túr summarmánaðirnar, so høvdu teir sjálvandi hildið fram við siglingini. Men veruleikin er ein annar.

Belegningurin á Hanstholm rutuni er so at siga 100% hvønn túr, og vit uppliva alla tíðina, at fólk spyrja um Hanstholm rutuna. Tí optimera vit tær rutur, sum kasta pening av sær, meðan vit niðurleggja tær órentablu ruturnar, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann vísir eisini aftur, at tað var siglandi upp á Bergen seinasta vikuskiftið.

Allat ferjur høvdu aflýst at sigla upp á Bergen farna vikuskiftið. Fjord Line royndi, men mátti gevast eftir tveir tíma royndir. Og sama túr valdu vit at bíða eftir Fjord Line, sum var seinkað, tí við vóru fýra føroyskar familjur, sum skuldu heim til Føroya við Norrönu. So vit royna sanniliga at taka fyrilit har vit kunnu, sigur Jákup Sverri Kass í stuttari viðmerking.




*Tað var ikki veður hjá Norrönu at fara inn í Bergen seinasta vikuskifti*